gult cyan magenta svart

SKEMT 2000

fæst í sølubúðunum kring alt landið
Kostnaður 120,-

Sosialurin - 311820

Nú er møguleiki fyri at ogna sær allar 12 SKEMT bøkurnar í signeraðum eintøkum fyri einans 650,- kr.

Bíleggið nú og tit fáa tær sendandi beinanvegin. Ringið til Sosialin á tlf. 31 18 20

ítróttur

Nr. 234 • t‡sdagur • 5. desember 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Søgulig løta í Klaksvík

Ta› var ein n‡ggjur partur av føroyskari ítróttasøgu, sum var› skriva›u, tá Jórun Ludvig fríggjadagin gekk á odda fyri føroyska A-landsli›i› í kvinnuhondbólti

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

Hóast talan í bá›um førum gjørdist um tap til føroysku kvinnurnar, so vóru nógvir positivir lutir at finna í avrikinum hjá føroyska li›num

Ni›anfyri hava vit í stuttum umrøtt avrikini hjá føroysku leikarunum, og ni›urstø›a okkara er, at samanumtiki› eigur føroysku hondbóltur nógv gott í væntu frá li›num. Tær allar flestu hava enn bestu hondbóltsárini til gó›ar, og kunnu tí enn mennast nógv.

Fortreytirnar fyri at mennast mest gjørligt áttu at veri› til sta›ar, nú li›i› er vor›in partur í altjó›a luttøku. Hetta gevur leikarunum n‡ggjar avbjó›ingar at stremba fram ímóti, og vil tí eisini í gerandisdegnum ver›a vi›virkandi til, at ta› lítla petti› eyka ver›ur lagt í venjingarnar.

Helena Dam

Fekk fulla spælití› í bá›um dystunum, og samnumtiki› borga›i avrik hennara eisini fyri somiki› stórari gó›sku, at ta› ikki var› ney›ugt at skifta. Serliga seinna hálvleik í seinna dystinum stó› hon seg væl.

Jórun Ludvig

Hev›i hei›urin av at vera føroyskur li›skipari, vi› tveimum solidum avrikum sta›festi hon eisini rætt sín til sessin.

Royndi alla tí›ina at stu›la li›feløgunum, og vi› einari rúgvu av yrvigongdum av veinginum, var hon eisini vi› til at gera føroyska álopsspæli› meira fjølbroytt.

Katrin á Neystabø

slapp at royna seg á bæ›i bakkinum og veinginum, men ta› tóktist sjónligt, at hon treivst betri á veinginum.

Í fyrra dystinum var ta› serliga í verjupartinum, at hon kom væl frá uppgávu síni, me›an hon í nógv størri mun var vi› til at mynda føroyska álopsspæli› í seinna dystinum.

Jacklin Durhuus

Fekk ikki afturvæl til seinna dystin, tá venjarin hev›i valt heldur at hava Ann Hansen vi›. Var annars í byrjanini millum fáu føroysku leikararnar, sum tordu at taka initiativ, men avslutningar hennara vóru sjáldan nóg neyvir.

Simona Hansen

Uttan at teljast millum tær mest stø›ugu á vøllinum, so átti Simona sín lut í avrikunum teir bá›ar dystirnar.

Tykist at hava tiki› seg fram tekniskt, sí›ani í fjør, men ein kundi í størri mun ynskt at sæ› hana sum skothóttan. Ta› hevur hon á›ur prógva›, at hon væl er før fyri.

Ta› var ein søguligur hending í føroyskum kvinnuhondbólti, tá Jórun Ludvig saman vi› svenska li›skiparanum heilsa›i upp á hollendska dómarapari ›

Mynd: Álvur Haraldsen

Annika Thomsen

Hóast rørslur hennara vi› hvørt tykist heldur óstortligar, so er eingin ivi um, at hondbóltsevnini eru av teimum heilt frægu. Serliga eru ta› skot hennara, sum eru ein hóttan, og hetta prógva›i hon eisini beinan vegin, tá hon kom á vøllin í fyrra dystinum. Eins og hjá Simonu hev›i tó veri› ynskiligt, um hóttanin vi› skotum úti frá var størri.

Joan M. Joensen

Royndi seg bæ›i sum spælskipari og vongur, og kom heilt væl frá hesum bá›um uppgávum.

Kvika fótskifti› hev›i vi› sær, at hon alla tí›ina var før fyri at hótta mótstø›uverjuna, og so var hon eisini ein av fáu føroysku leikarunum, sum megna›i at skjóta úti frá.

Taldist samanlagt millum bestu føroysku leikararnar.

Gunnleyg Berg

Strikuspælarin, sum til dagliga spælir í Íslandi, var næsta val til plássi›, og var ta› tí avmarka›, hvussu nógv hon fekk gjørt um seg.

Tá hon var á vøllinum s‡ndi Gunnleyg tó stóran strí›svilja, og ikki minst í verjupartinum kom hetta heni til gó›ar.

Sóley› Mikkelsen

Var ta› nakar føroysku leikari, sum av álvara skara›i framúr, so mundi ta› vera Sóley› Mikkelsen.

So stórur var leiklutur hennara, at fyrri dysturin kundi fingi› eina ø›rvísi gongd, um hon hev›i veri› vi› alla tí›ina.

Tóktist fullkomuliga ósmæ›in, tá ta› ráddi um at bjó›a mótstø›uni av, og í seinna dystinum var talan um einstakar deteljur, sum fingu ásko›arafjøldina at hei›ra henni vi› lógvabrestum.

Var harumframt einasti leikarin, sum megna›i at skora upp á brotskast, og s‡nir hetta eisini, hvussu væl hon megna›i at taka ímóti stóru avbjó›ingini.

Christina Holm

Var fyrsta val til strikuplássi›, og hon takka›i fyri áliti› vi› at fremja eitt av betru føroysku avrikunum.

Bæ›i í verju- og álopsspælinum taldist hon millum t‡dnignarmestu føroysku leikararnar, og ikki minst var ta› imponerandi, hvussu væl hon stó› seg kropsliga móti vælvaksnu svensku strikuni.

Guri› Mortensen

Spældi bæ›i á bakkinum og á mi›plássinum, og einki er at ivast í, at føroyskur hondbóltur í framtí›ini kemur at fáa stóra gle›i av evnum hennara.

Toktist í byrjanini av fyrsta dystinum nógv darva› av nervum, men eins og vi› restini av vi›leikrunum gjørdist smædni alt minni, so hvørt sum tali› av minuttum hækka›i.

Ann Hansen og Hildur Sørensen

Vóru eisini vi› á dómarase›lunum, men vegna væntandi spælití› ber ikki til at geva teimum naka› sko›smál.

Einki er at taka seg aftur í, at stóri føroyski leikarin var Sóley› Mikkelsen. Hon sló›a›i fyri, tá føroyska smædni skuldi fáast burtur, og í fleiri førum var talan um sera vakrar detalju frá hondum hennara

Mynd: Álvur Haraldsen